Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Dagfesting: 19. september 2023
Mál nr.: 23/16155
Málsviðgjørt: jd

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
§ 1. Fyri filmar, sendirøðir og heimildarfilmar, sum verða framleidd í Føroyum, verða 25% av útreiðslunum, sum eru hildnar í Føroyum, afturbornar, um umsøkjarin lýkur treytirnar fyri at fáa afturbering. Afturberingin er í mesta lagi 5 milliónir kr., sbr. tó stk. 2. *Stk. 2*. Fer afturberingin upp um 5 milliónir kr., kann upphæddin, ið er oman fyri 5 milliónir kr., berast aftur, um játtan til hetta fæst til vegar á løgtingsfíggjarlógini. *Stk. 3*. Í seinasta lagi 15. august á hvørjum ári letur Filmshúsið landsstýrismanninum eina skikkaða meting av verkætlanum, sum væntandi verða framdar í komandi fíggjarári.	**§ 1**. Fyri filmar, sendirøðir og heimildarfilmar, sum verða framleidd í Føroyum, verða 25% av útreiðslunum, sum eru hildnar í Føroyum, afturbornar, um umsøkjarin lýkur treytirnar fyri at fáa afturbering. Afturberingin er í mesta lagi 5 milliónir kr., sbr. tó stk. 2. *Stk. 2*. Fer afturberingin upp um 5 milliónir kr., kann upphæddin, ið er oman fyri 5 milliónir kr., berast aftur, um játtan til hetta fæst til vegar á løgtingsfíggjarlógini. *Stk. 3*. Í seinasta lagi 15. august á hvørjum ári letur Filmshúsið landsstýrismanninum eina skikkaða meting av verkætlanum, sum væntandi verða framdar í komandi fíggjarári. *Stk. 4*. Filmshúsið skal í seinasta lagi 1. februar á hvørjum ári lata landsstýrismanninum eina frágreiðing um virksemið í undanfarna álmanakkaári.

§ 4. Afturbering av útreiðslum verður bert veitt føroyskum partafelag ella smápartafelag. *Stk. 2.* Felagið skal setast á stovn til ítøkiligu framleiðsluna, sum afturberingin viðvíkur. Felagið hevur ábyrgdina av, at framleiðslan verður framd í Føroyum. Útreiðslurnar, sum afturberingin viðvíkur, skulu bókast í felagnum.	**§ 4.** Afturbering av útreiðslum verður bert veitt føroyskum partafelag ella smápartafelag. *Stk. 2.* Felagið hevur ábyrgdina av, at framleiðslan verður framd í Føroyum, og at ein grannskoðaður verkætlanarroknskapur verður gjørdur fyri ta einstøku framleiðsluna. Verkætlanarroknskapurin skal vísa allar útreiðslur, sum afturberingin viðvíkur, og útreiðslurnar skulu bókast í felagnum.